

OLJUTINGIÐ
Petroleum Association of the Faroe Islands

# Fyrstu oljuboringarnar á føroyska landgrunninum.

Vit bjóða til limafund 10. oktober kl. 19.00 í Listaskálanum. Evnið á fundinum verður fyrstu oljuboringarnar á føroyska landgrunninum, har dentur serliga verður lagdur á operativu síðuna.

Fyrilestrahaldarir verða Ben Arabo, stjóri í Amerada Hess Føroyar og Magni Arge, stjóri í Atlantic Airways.

Vinarliga melda til kvøldið í Vinnuhúsinum á telefon 311864 - ella um teldupost: industry@industry.fo í seinasta lagi mánadagin 8. oktober.

**Til ber at melda seg sum lim í Oljutinginum í Vinnuhúsinum**



# LBF søkir verkfrøðing

Vit søkja ein dugnaligan verkfrøðing til spennandi projekterings- og eftirlitsuppgávur innan byggi- og anleggsfakini.

Nærri upplýsingar fáast við at ringja til Hanus Hansen á telefon 314744.

**Landsbyggifelagið P/F, Ráðgevandi Verkfrøðingar**
Postboks 228
Grønlandsvegur 5
110 Tórshavn



# Lærlingur

Seytjan í Klaksvík søkir lærling.

Hevur tú FHS ella HH, er dugnalig/ur og røkin, og áhugað/ur at seta snið og litir saman, send so eina skrivliga umsókn til Seytjan.

Seytjan
Box 127
110-Tórshavn
Freistin at søkja er 10. oktober


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2274, Sp/f Í Króki, 100 Tórshavn.

Viðtøkur broyttar: 19.02.2001
Lækkan av P/F-peningi viðtikið 14.08.2001 er nú gjøgnumførd.
Kapitalur: Kr. 200.000,00.
Nevnd:
Farin úr nevndini: Jón Johansen, Láarvegur 7, 100 Tórshavn (formaður), Katrin Ólfríð Johansen, Láarvegur 7, 100 Tórshavn, Sjúrður Johansen, Láarvegur 7, 100 tórshavn og Leif Allan Johansen, Láarvegur 9, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóranum.

Skráseting Føroya tann 28. september 2001

Kristin Balle


# Størv sum málsviðgerðar

Toll- og Skattstova Føroya

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálastýrinum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, mvg-, kolvetnisskatta- og avgjaldslógirnar, inntøkuskattalógina v.m. og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum.

Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Tórshavn, Saltangará og Klaksvík røkja raksturin.

Núverandi setanarøki er Streymoyar øki, men fevnir annars um aðalstýrini, løgmansskrivstovuna og deildir teirra, og tann, ið settur verður, skal kunna røkja tænastu á hesum støðum, um tað verður kravt.

Søkt verður eftir 2 málsviðgerðum til Streymoyar øki. Einum til fast starv á eftirlitsdeildini og einum sum avloysari í eitt ár í innheintingini til setan 1. november 2001 ella so skjótt, sum til ber.

**Høvuðsuppgávur Eftirlitsdeildin:**
Daglig málsviðgerð og eftirlit serliga innan MVG og vinnuskránna, herundir svara munnligum og skrivligum fyrispurningum.

**Førleikakrøv Eftirlitsdeildin:**
Tann, sum settur verður, skal hava roknskaparligt innlit og kunnleika til vinnulógir umframt skatta- og avgjaldslógir. Viðkomandi, ið settur verður, skal hava vilja til at luttaka í teimum útbúgvingarmøguleikum, sum Toll- og skattstovan bjóðar bæði á stovninum og uttan fyri stovnin eitt nú á handilsskúla v.m. og taka lut í teimum skeiðum, sum stovnurin fyriskipar. Viðkomandi skal vera arbeiðssamur og fyrikomandi, og skal kunna arbeiða sjálvstøðugt.

**Høvuðsuppgávur Innheintingardeildin:**
Daglig málsviðgerð av almennari skuld, herundir gera gjaldsavtalur, útrokningar av gjaldsførisførleika og svara munnligum og skrivligum spurningum frá viðskiftafólki.

**Førleikakrøv Innheintingardeildin:**
Tann, sum settur verður, skal helst hava kunnleika til innheintingararbeiði og innlit í roknskaparviðurskifti. Tað er ein fyrimunur at hava prógv í incasso v.m. Viðkomandi, ið settur verður, skal hava vilja til at luttaka í teimum útbúgving-armøguleikum, sum Toll- og skattstovan bjóðar bæði á stovninum og uttan fyri stovnin eitt nú á handilsskúla v.m. og taka lut í teimum skeiðum, sum stovnurin fyriskipar. Viðkomandi skal vera arbeiðssamur og fyrikomandi, og skal kunna arbeiða sjálvstøðugt.

**Vit kunna bjóða**
Spennandi størv við nógvum avbjóðingum, sum samstundis eisini eru fakliga krevjandi og við møguleikum fyri eftirútbúgving, v.ø.o. sjálvstøðug størv í góðum arbeiðsumhvørvi.

**Setanartreytir**
Løn- og setanarviðurskiftir, sum eru treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

**Spurningar hesum viðvíkjandi** kunnu setast Hallbjørg Hansen, deildarleiðara, á tlf. 31 02 60, lok. 108.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvum og upplýsingum um viðkomandi starvsroyndir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi

**15. oktober 2001**

Toll- og Skattstova Føroya, Streymoyar øki
Postsmoga 3139
110 Tórshavn

Heimasíða
www.tollskatt.fo

E-mail
streymoy@tollskatt.fo


**Vegna plásstrot, kom ikki alt lýsingartorgið við í dag.**

**Sosialurin**



# HEILSANIR



**Góða Ann**
Hjartaliga tillukku við 40 ára føðingardegnum. Vit vóna at tú fær ein góðan føðingardag á Eiði.
**Mamma og babba**



**Góða Vera**
Hjartaliga tillukku við 2 ára føðingardegnum.
**Heilsan, omma og abbi**



**Góði langabbi**
Hjartaliga tillukku við 80 ára føðingardegnum og alt gott í framtíðini ynskja
**Mekhala, Rakul, Pauli, Beinir og Hjarnar**



**Góða Barbara gumma**
Hjartaliga tillukku á 15 ára degnum tann 30.9. Eisini ein heilsan til langommu við 82 ára degnum tann 28.9. ynskja vit øll í Danmark.
**Joen Hendrik og Tonja Elin**



**Góða Herit í Keypmannahavn**
Hjartaliga tillukku við 21 ára degnum tann 22.9. ynskja
**mamma, babba og Hildigunn**



**Góða omma**
Tillukku og gleði við 60 ára degi ynskja
**øll ommubørnini í Gøtu**



**Góða langomma**
Hjartaliga tillukku við 75 ára føðingardegnum 3. okt. ynskja
**Frank, Jóhan og Árni**



**Góða Tonja Elin í Århus**
Hjartaliga tillukku við 1 ára føðingardegnum tann 23.9. ynskja
**omma, abbi og mostir**





**Góða Petra**
Hjartaliga tillukku við 13 ára føðingardegnum í dag. Her hevur tú nógv at gera.
**Heilsan, mamma, babba, Hans og Ragnar**



**Hey, mín elskaði!**
Eitt stórt tillukku við teimum 30. Alt tað besta.
**Tin ubba-schille**


## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:...................................................................
...................................................................
...................................................................
...................................................................
...................................................................
...................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ...................................................................
Bústaður: ...................................................................
Bygd/býur: .................................... Tlf.: .................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »Heilsanir«